# Minningarorð um Magna Hentze

## Føddur 19.07.71 og Deyður 01.01.07



Tung, myrk og ófrættakend skýggj komu rekandi inn eftir Trongisvágsfirði nýggjársdag við boðum um, at Magni Hentze var funnin druknaður í Havn. Sorgin um tín deyða hevur fastatøkur í hjørtum okra, tí okur halda ikki, at tú visti, hvønn týdning tú hevur havt fyri TB og viðleikarar tínar. Tú var fyri okum, sum veruliga kendu teg, ein sonn fyrimynd. Sum ein sterkur, atletiskur og intelligentur málmaður við nærum óveruligum reaktiónsevnum vísti tú vegin, hvussu ein ítróttarmaður og rættur TB-leikari eigur at bera seg at. Tú legði tínar kostvanar um og røkti sum heild kropp tín væl. Tú tók hvørja venjing sum ein dyst, ið skuldi vinnast. Ongantíð vart tú tann, sum gjørdi nógv burtur úr tær sjálvum. Heldur latst tú aðrar sleppa framat og fáa rós, tá góð úrslit vóru fingin til høldar, men okur vistu altíð, at tín partur ongantíð lá eftir.

Tað er ikki bara tín leiklutur á vøllinum, sum hevur tokka okra millum. Í umklæðingarrúminum skapti tín eyðmjúka og róliga medferð altíð ein hugnaligan dám. Tú vart altíð ein, sum lurtaði, og sum allir kundu venda sær til. Allir kendu okur Magna sum ein mann, ið ein kundi tosa við um alt.

Nú er kanska ikki at dylja, at tú var eitt menniskja, ið ikki altíð kendi teg væl í teimum kørmum, sum samfelagið ásetir. Teir dagar, tá tú var burturstaddur, vóru merktir av ótta, tí okur vistu, at tú hevði álvarsligar trupulleikar at berjast við. Sjálvt um málmenn síðan eru komnir og farnir, er ongin í heiminum, sum kann taka títt pláss, Magni! Tú varð altíð saknaður av øllum. Skápið, við 1-talinum klistraðum á, stóð ofta longi tómt. Men eftir eina tíð komst tú altíð aftur og gjørdi tað stuttligari hjá okum at koma til venjingar, og niðurlagið var tað sama okra millum hvørja ferð: „Tað er gott at hava Magna aftur.“ Nú er so greitt, at skápið við 1-talinum ongantíð fer at fyllast við tínum klæðum aftur, tó minnini um teg fara ongantíð at tømast, og við sorgblídni kunnu okur minnast ein málmann og eitt menniskja, sum, tá á stóð, altíð var ein tryggur skansi.

Okur vóna bara, at hesi fátøku orð kunnu verða ein uggi hjá tínum nærmastu, og vónandi fara tey at hóma ein skáa úr teimum myrku skýggjunum, sum hava lagt sítt tunga tak yvir okum øll.

*Goymdur, men ongantíð gloymdur*

**TB-ararnir**

## Andlát og jarðarferðir

**Svabona Ellefsen, Miðvágur**, andaðist á Ellisheiminum 26. februar 75 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinri.

Kistan við **Josefinu Pedersen, Ringsted**, fer úr kirkjugarðakapellinum í Ringsted hósdagin 1. mars klokkan 12.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu okkum hjálp og smakenslu, tá kæri maður mín, pápi, abbi og verfaðir okkara

**Sjuman Johansen**
Vestmanna

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Føroya felag móti krabbameini.
Ein heilsan til starvsfólkið á B6 fyri hjálp og umsorgan tíðina hann lá hjá tykkum.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jonna,**
**Grækaris og Anja**

# Øssur Mohr fær góð ummælir

Leygardagin 17. februar var fernisering Galleri Sct Gertrud, Knabrostræde í Keypmannahavn í sambandi við at føroyski listamaðurin, Øssur Mohr úr Fuglafirði, læt upp eina listaframsýning við nýggjum málningum.

Umleið 200 vóru til ferniseringina, bæði danir og føroyingar. Stanley Samuelsen undirhelt við gittarspæli.

Í blaðnum ”Kunstavisen” fær framsýningin hjá Øssuri Mohr góð ummælir.

Framsýningin er opin til 3. mars, opið er: týsdag til fríggjadag kl. 14 - 17.30, og leygardag kl. 11 – 14.



*Umleið 200 vóru til ferniseringina. Í miðjuni sæst Øssur Mohr*



*Stanley Samuelsen undirhelt við gittarspæli*



*Listaframsýning við nýggjum málningum*

**Dagurin**

**28. februuar. Hildigerð.** Høgt mett týsk abbadissa, sum doyði í 1179. Upprunaligt germanskt navn, samansett av orðum, ið merkja stríð og vernd.

# Meiken Krabenhøft á ting

TÍÐINDASKRIV



Týsdagin tók Meiken Krabenhøft sætið á tingi fyri Páll á Reynatúgvu, sum hevur biðið um farloyvi.

Meiken Krabenhøft var næstvald á lista Tjóðveldisfloksins í Sandoynni til løgtingsvalið 2004.

Meiken hevur einaferð áður havt sætið á tingi.